## DAGSINS MEINING

# Karsten enn einaferð

Hvørja ferð landið liggur í verkfalli, kostar tað samfelagnum milliónir í mistari arbeiðsinntøku og mistum útflutningsvirði, eftirsum føroyska umdømið hjá keyparum uttanlands versnar. Eitt verkfall er sera álvarsamt, og eigur at verða nakað, ið hendir undantaksvís. Hetta tykist ikki verða fremst í huganum hjá sitandi landsstýrismanni í fíggjarmálum, ið helst man hava met í medábyrgd av verkføllum, ið eru nærum hvørja ferð samráðingar eru á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum. Hetta er syrgiligt og bløðir skattgjaldarin fyri hetta antin so ella so. Munnu spardu upphæddirnar hjá Karsteni standa mát við mistu milliónirnar av tí, at landið hevur ligið lamið so ofta? Neyvan.

Eitt er, at Karsten Hansen eftir øllum at døma dugir illa at samráðast við fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum, og ótaktiskt tosar um fólk, ið mala millum húsini í Havn, men tað má sigast at verða eitt avrik av teimum heilt stóru, at hann nú eisini megnaði at medvirka til eitt verkfall á privata arbeiðsmarknaðinum.

Tað er einki minni enn ein brølari at koma sum ketta burtur úr høvdatrog og nokta at góðkenna sáttmálan hjá SEV langt aftaná, hann er undirskrivaður og eisini aftaná, at maskinmeistarnir hjá SEV hava fingið útgoldið løn eftir nýggja sáttmálanum. Um Karsten Hansen gongur ørindi fyri Arbeiðsgevarafelagið skulu vit ikki siga, men sína vitjunartið kendi hann so ikki í hesum førinum.

Karsten Hansen hevði staðið seg best við at sitið kúrrur, nú samráðingarnar vóru á privata arbeiðsmarknaðinum, og latið partarnar samráðst í frið. SEV málið átti at verið farið, tí Karsten Hansen var ov seinur á sjóvarfallinum.

Tað eru altíð fleiri partar í einum verkfalli, men nú hava vit so løgnu støðuna við einum verkfalli á privata arbeiðsmarknaðinum, har landsstýrismaðurin í fíggjarmálum eigur sín stóra part av skyldini. Nú er bara at vóna, at landið ikki harafturat missir streymin av framferðini hjá landstýrismanninum. So hevur hann sligið allar rekordir í vánaligari handfaring av málum, ið hava við arbeiðsmarknaðin at gera. U-lands viðurskifti sum streymloysi av, at ein landstýrismaður ikki dugir at avmarka seg til tað, hann eigur at avmarka seg til, kunnu skattgjaldarar snøgt sagt ikki liva við í einum framkomnum Norðureuropeiskum samfelag í 2003.

Karsten hevur vassað á bláman og hevur drigið arbeiðsmarknaðin við sær. Nú mugu allar góðar kreftir til, soleiðis at hann og arbeiðsmarknaðurin koma uppá turt aftur skjótast gjørligt. Føroyska samfelagið hevur ikki ráð til verkfall, óansæð hvør hevur feilin.

**Sosialurin**

# Hósvík í tvíningar

**Martin Sømark**
*Bygdaráðslimur*

Tað kom sera óvart á meg, at vit í Hósvík koma at standa einsamøll úti í kuldanum.

Altíð havi eg sum gamal sambandsmaður hildi, at tað sum er mest umráðandi í útjaðaranum, er at standa saman, tá ið tað kemur til trivnað og tað fíggjarliga.

Heilt nógvir sambandsmenn í Hósvík stóðu saman um at tey/teir ikki vildu hava nakrar broytingar í framtíðini. Hetta er ikki óvanligt fyri sambandsmenn.

Tó skal sigast, at tað finnast tvey sløg av sambandsmonnum í dag. Hetta er fólk ið vilja hava broytingar, onnur ikki.

Vit sum sita í bygdaráðnum vita, at vit hava fingið ábyrgdina av at reka og menna bygdina fyri eitt valskeið ísenn.

Bygdaráðið hevur tosað nógv um, at tað er rætt at royna at leggja saman kommununar í Sundalagnum. Her vóru vit ikki heilt samd at byrja við. Hetta er tó broytt nógv ta síðstu tíðina, tí vit síggja at hetta er neyðugt, fyri at vit ikki skulu fáa alt ov nógva umsiting og møguliga fíggjarligar trupulleikar í kommununi.

Eitt komandi bygdaráð fær at síggja, hvussu trupult tað verður at fáa endarnar at røkka saman, tá ið Landsstýrið er liðugt at leggja allar uppgávurnar út á kommunurnar.

Hetta er nakað sum Landstýrið arbeiðir nógv við í løtuni.

Eg vóni, at vit í bygdaráðnum framvegis kunnu arbeiða fyri einum møguligum barnagarði/vøggustovu/frítíðarskúla í Hósvík.

Tey flestu sum búgva í Hósvík, vilja hava ein ansingarstovn, sum skjótast.

Hetta verður sjálvandi ikki lætt, tí hesin fer at kosta kommununi nógvan pening.

Vit skulu tó klára at gjalda bygningina.

Tað sum eg síggi fyri mær er, at tað verður sera trupult at reka henda stovn og møguliga núverandi dagrøkt, tí vit eru so fá fólk í Hósvík til at fáa hetta at bera til.

Vit skulu heldur ikki gloyma, at vit hava í løtuni ein barnaskúla, sum er ov lítil í dag.

Skúlin má møguliga útbyggjast longu komandi valskeið.

At bara Hósvík segði nei, tá ið atkvøðugreiðslan var um samanlegging, má koma sera óvart á nøkur/nakrar nei-veljarar. Og sera óvart á okkum, sum søgdu ja.

Eitt er heilt greitt, at Hósvík kemur ikki at hava eitt skattaprosent á 17% ella 17,5% í framtíðini við at standa einsamøll.

Vit í bygdaráðnum gera ikki meira við málið um samanlegging við Sunda kommunu á hesum sinni. Vit mugu góðtaka at meirilutin av Hósvíkingum ikki vil leggja saman við kommunum norðanfyri. Tað fer bara at krevja nógv meira av okkum, sum sita í bygdaráðnum nú og teimum, sum til næsta valskeið skulu yvirtaka.

Men fáa vit eina sterka áheitan frá bygdafólkinum, um at gera meira við málið, so fara vit at umhugsa støðuna.

Eg vil bara til síðst vóna, at bæði ung sum gomul framvegis fara at støðast í Hósvík.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Peter Sofus Eliasen**
vanliga nevndur Dosi, Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk tit á Vistarheiminum, bæði starvsfólk og búfólk, fyri, at tit vóru so góð við hann og tóku tykkum so væl av honum. Somuleiðis ein tøkk til tykkum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, har hann lá eina tíð.

Tøkk til Niels Paula Danielsen, prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravara. Takk fyri blómur, kransar og gávur.

Stóra tøkk øll tit, sum hjálptu okkum so væl á ymiskan hátt og annars øll tit mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Hjartan tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Peter Ove Eliasen**

## Tøkk

Hjartaliga verður takkað fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Nanna E. Olsen**
Á Hellu, Toftum

andaðist varð jarðað pálmasunnudag.

Takk fyri blómur og kransar, heilsanir og gávur til Heim fyri eldri á Toftum.

Takk øll á Vistarheiminum við Toftavatn fyri kærleika og umsorgan, og Røktarheimið fyri umsorgan og hjálp meðan hon lá sjúk.

Takk øll, ið vóru við til andaktina á Røktarheiminum, tá steðgað var á við heimið á Hellu og kórsetingina.

Takk Martin R. Jacobsen og Poul Færø, takk kirkjutænarar, sangarar, bilførari og gravari og øll, sum vóru við til jarðarferðina.

Takk øll, ið stákaðust við ervinum og øll, ið vóru saman við okkum har.

Hjartans tøkk øll somul.

**Axel, Gunnar, Josefina og Poul Johan**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.